





# Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri gávur, fjarrit og heilsanir á 80 ára degnum.

Heilsan
**Jógvan Evald Jacobsen, Leirvík**













# Føroysk orð í amerikanskari teknirøð

**TEKNIRØÐ**
*Eyðun Klakstein*

Tríggjar ferðir um vikuna greiðir amerikanska teknirøðin Shoecabbage frá einum nýggjum orði á einum fremmandum máli.

Málini, sum sleppa upp í part, eru nógv í tali, og nú er føroykst eisini komið inn í hitan. Í næstu viku verður greitt frá orðinum spik, og ætlanin er at taka fleiri føroysk orð við í teknirøðina, sum kann finnast á internetinum. Adressan er ucomics.com/shoecabbage/

– Orðini, sum vit brúka í okkara teknirøðum, verða nýtt til at undirhalda lesarar, samstundis sum teir fáa upplýsingar um okkurt fremmant mál – serliga minni og ókend mál, sigur Teresa Dowlatshahi, sum stendur fyri teknirøðini. David Stanford er teknari.

Shoecabbage er partur av virkseminum hjá uclick, sum er størsti veitarin av teknirøðum á internetinum. Fyritøkan heldur til í Kansas City, og eini 25 milliónir fólk vitja hvønn mánað síðurnar hjá uclick.

Framleiðararnir av teknirøðini vilja gjarna frætta frá føroyingum, um hugskot eru til onnur føroysk orð at brúka í teknirøðini. Uppskot kunnu sendast til shoecab3@yahoo.com







| | Teletið | GSM FRÍTÍÐ |
|---|---|---|
| Stovnan | 300,-* | 0,- |
| Mánaðargjald | 0,- | 40,- |
| Samrøður - dag | 3 kr/min | 2,25 kr/min |
| Samrøður - kvøld | 2 kr/min | 0,75 kr/min |
| SMS-boð | 0,75 | 0,50 |

*írokna kr. 100,- talutíð